lívdin
- í lívd hins hægsta
Desember 2008



# Ung lív í Lívdini



Felagsmynd av ungdóminum í UngLív, sum er eitt tiltak fyri børn í 4. flokki og eldri. Tiltakið er hvønn sunnudag, samstundis sum sunnudagsskúlin og seinna møtið eru. Tað vóru Rakul Eysturtún og Magni á Lakjuni, ið tóku stig til UngLív, sum byrjaði í februar.

Myndina tók Magni á Lakjuni sunnudagin 2. november 2008.

## Innsavning til Bíbliur

Á kunningarborðinum í Lívdini stendur ein krukka, sum fólk hevur høvi at lata pening í til prenting av Bíblium í Kina. Kostnaður fyri prent og útbreiðslu av einari Bíbliu í Kina er 20 kr.

Eisini ber til at stuðla tiltakinum við at flyta pening á kontu í Eik banka: 9181 128.239.7, viðmerkt: Bíbliur til Kina.

Tann størsta vekingin í samkomusøguni er í dag í Kina. Tað ger, at tørvurin á Bíblium er ovurhonds stórur. Málið er at útvega Kina 100.000 Bíbliur frá føroyingum.

Ábyrgd av tiltakinum hava Jógvan Zachariassen og Jeffri Johannesen.



## Tra La La... Bla

Jólini nærkast í hvørjum, og lukturin av nýbakaðum piparnøtum og frískum jólagløggi hongur í luftini. Gøturnar eru jólaskrýddar, og jólatónleikurin er at hoyra allastaðni. Vit hava øll lætt við at syngja "Tra La La..." Men vita vit, at fyri mong eru jólini ein sera tung tíð? Fyri nøkur eru jólini "Tra La La...Bla."

Tunglyndi á jólum? Ber tað til? Ja, hugsa um tey børn og ung, sum uppliva síni fyrstu jól uttan babba ella mammu. Hugsa um foreldur, sum hava mist síni børn seinasta árið, ella har børnini eru flutt burtur í onnur lond og ikki koma heim á jólum. Hugsa um einkjuna ella einkjumannin, sum fyrstu ferð skal halda jól einsamøll ella einsamallur, ella ein, sum stúrir fyri aftur í ár at sita einsamallur. Hugsið um tey gomlu og sjúku, sum eru einsamøll.



Latið okkum ikki gloyma hesu kæru menniskju henda mánaðin. Jákup sigur í brævi sínum: *"Rein og lýtaleys gudsdýrkan fyri Gudi og Faðirinum er hetta: At vitja faðirleys og einkjur í trongd teirra"* (Ják. 1:27).

Latið okkum í Lívdini prísa Gudi hesi jólini við at vitja tey, sum stríðast, leingjast, sakna, syrgja og eru einsamøll! Latið okkum gerast ein teirra á sama hátt sum Jesus, tá ið Hann kom inn í henda heim at gerast ein av okkum.

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Anna og Petur givið fløgur út




Fríggjadagin 28. november kom fyrsta soloflogan hjá songkvinnuni Onnu D. Háberg á marknaðin. Fløgan kallast "Nakið". Av teimum tíggju sangunum, sum eru á fløguni, eru átta nýggir. Sangirnir hava eitt sorgblítt huglag og endurspegla hendingar, sum Onnu hevur verið fyri – hendingar, sum vendu tilveruna á høvdið.




Føroyski bólkurin Bet You Are William við Peturi W. Háberg á odda hevur givið út fløguna "See inlaid heart for details" saman við føroyska plátufelaginum Rock Pipit Records. Á fløguni eru 11 egin løg hjá Peturi sum t.d. tey nógv spældu "Here We Go Stereo" og "Dynasty".

## Mammubólkur á Brekku

Annanhvønn fríggjadag kl.10.30 fyrrapart er mammubólkur í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík. Mammubólkurin er fríggjadag í líka viku, t.v.s. viku 42, 44, 46 o.s.fr. Allar mammur við smáum børnum eru vælkomnar.

Er okkurt at spyrja um, eru tit vælkomar at ringja til Súsonnu Joensen á tel. 319899.



## Jógvan í Suðurkorea

Í døgunum 17. oktober til 3. november vitjaði Jógvan brøður og systrar í Suðurkorea. Høvuðsendamálið var at undirvísa á CTI (Christian Training Institute) bíbliuskúlanum í Seoul. Hesin bíbliuskúli er ein partur av alheimsfelagsskapinum hjá GLO (Gospel Literature Outreach).

Á bíbliuskúlanum eru umleið 30 næmingar. Flestu teirra eru fulltíðar Harrans tænarar, samkomuleiðarar, elstar og trúboðarar, sum fyrireika seg at fara út at kunngera evangeliið. Jógvan undirvísti í evnunum: Markusar evangeliið, andalig leiðsla og tónleikur, list og samkoman.

Jógvan vitjaði eisini samkomur í Seoul umhvørvinum. Tær vóru ymiskar í støðd – úr 50 fólkum upp í 1000 fólk. Samkomurnar eru sera sterkar í bønarlívi og evangelisering. Hetta eru brøður og systrar, sum á undurfullan hátt duga at biðja og røkka sínar grannar og vinir fyri Kristus. Læra er eitt umráði, sum samkomurnar ikki eru so sterkar í, og tí vóru tey sera glað fyri undirvísingina, sigur Jógvan.

Jógvan sá eisini nógv í Suðurkorea, har hann t.d. vitjaði gamlar bygdir, elligamlar keisaraborgir, eitt barnaheim fyri heimleys børn, heimsins størstu samkomu, sum telur 800.000 limir og eitt av mongu bønarfjøllunum, sum eru í Suðurkorea.



*Heimsins størsta samkoma*



*Koreatúrurin*

*Talar í somkomu*

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

| | |
|---|---|
| 2. des.: | Bønarløta |
| 9. des.: | Húsbólkar |
| 16. des.: | Bønarløta |
| 23. des.: | Einki møti |
| 30. des.: | Einki møti |

## Gloymdir lutir

Tá vit rigga av eftir møtini sunnudag, kemur tað javnan fyri, at ymsir lutir liggja eftir. Tað kann verða klæðnalutir, hjá bæði børnum og vaksnum, prýðislutir, bíbliur o.s.fr.

Tey, sum finna gloymdar lutir, verða biðin um at leggja teir í kassan, og tey, sum hava mist okkurt, kunnu leita í kassanum.

## Bønarløtur á Brekku

Skipað verður fyri bønarløtum í hølunum á Brekku hvønn mánadag kl. 08.10, hvønn týsdag kl. 16.10 og hvønn fríggjadag kl. 12.10. Haraftrat er ein bønarløta hvønn sunnumorgun kl. 10.10 í Hoyvíkar skúla.

Á bønarløtunum á Brekku verður umframt at biðja eisini gingið gjøgnum bønirnar í Sálmunum. Tað eru Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen, sum skipa fyri.

## Tørvur á monnum til Hjálparhondina

Ein av mongu tænastunum í Lívdini er Hjálparhondin, sum hevur virkað í umleið sjey ár við tí endamáli at skipa praktisku síðuna av umsorganini. Tað vóru Durita Djurholm og Beinta Áargarð, ið stovnaðu Hjálparhondina.

Fleiri kvinnur eru við í tænastuni, men tørvur er eisini á monnum í hesi tænastu.

Tað er altíð ein signing at fara út til fólk vegna Hjálparhondina. Fólk taka væl ímóti okkum, tá ið farið verður við onkrum bakstri ella líknandi. Okkara ynski er, at fólk lata hoyra frá sær, tá ið ein tørvur vísir seg at vera. Vit fáa ikki vitjað fólk, verða vit ikki kunnað um tørvin, siga Beinta Áargarð og Hanna Nielsen, sum í dag hava leiðsluna av Hjálparhondini.

Áhugað kunnu venda sær til Beintu Áargarð á tel. 312655 / 512655 mail aargard@kallnet.fo ella Honnu Nielsen á tel. 310155 / 510155 mail: hangun@post.olivant.fo




*Tørvur er serliga á monnum til Hjálparhondina*

Ungdómurin í Lívdini hevur sína egnu heimasíðu, sum er:
**www.ung.livdin.fo**

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 7.desember

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Absalon og Beinta framføra* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Barn er føtt, sonur er givin (Es. 9.6)* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 14. desember

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Sjónvarpsmøti* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Fyrstu jólasálmarnir (Lukas 1 og 2)* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 21. desember

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Familju- og jólamøti* |
| | *(útisetar luttaka)* |

### Sunnudagin 28. desember

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Familju- og nýggjársmøti* |
| | *(útisetar luttaka)* |










** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*